# Eldsbruni kravdi eitt mannalív

**Stutt eftir klokkan 5 fríggjamorgunin varð boðað frá eldi í einum sethúsum á Sandi. Eldurin fór illa við húsunum, og hartil læt ein kvinna eisini lív. Orsøkin til eldin er ikki staðfest enn**

ELDSBRUNI
*Ingrid Bjarnastein*

**Sandur:** Klokkan 05.16 fríggjamorgunin varð boðað frá eldi í einum sethúsum mitt í bygdini Sandi. Onkur var komin framvið, sum sá, at tað logaði burturúr húsunum, og hevði tískil boðað løgregluni frá.

Upplýst verður av sýsluskrivstovuni á Sandi, at tað gekk rímiliga væl at sløkkja. Eldurin hevði tó fest so mikið væl í, at sløkkiliðið á Sandi noyddist at biðja um hjálp frá Skopun eisini.

– Takið var niðurbrent og útveggirnir eru nærum eisini niðurbrendir. Eg veit tó ikki neyvt at siga, nær eldurin var sløktur, men beint áðrenn klokkan seks var sløkkiliðið í Skopun boðsent, sigur vakthavandi á sýsluskrivstovuni á Sandi. Hann leggur afturat, at eldurin var so mikið stórur, og tí noyddust sløkkiliðsmenninir at fáa hjálp til, at eldur ikki kom í húsini rundanum.


*Tíðliga fríggjamorgunin stóðu húsini í ljósum loga. Av sýsluskrivstovuni á Sandi verður sagt, at rímiliga væl gekst at sløkkja*

*Mynd: Óskar Óskarsson*

### Eitt mannalív

Klokkan gott seks høvdu sløkkiliðsmenninir fingið so mikið tamarhald á eldinum, at teir kundu fara inn fyri fyrstu ferð. Tá funnu teir útav, at eitt lík lá innanfyri. Talan var um eina kvinnu.

– Vit hava fingið eyðmerkt, hvør hon er. Líksýn hevur verið, men um kvinnan er deyð av roykeitran ella sjálvum eldinum, vita vit ikki enn at siga.

Menn frá Kriminalteknisk Afdeling eru komnir til Føroya fyri at finna útav, hvør orsøkin til eldsbrunan er. Menninir komu upp sunnudagin, og arbeitt var beinanvegin við, at finna orsøkina.

Um eldurin er ásettur ella talan hevur verið um eitt óhapp veit ongin enn at siga, men hetta verður sjálvsagt kannað.

# Fleiri koyrt ávirkað

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Tíðliga fríggjamorgunin varð eitt ferðsluóhapp við eini knallert og einum persónsbili við krossin Tinghúsvegur-Bøkjarabrekka í Havn.

Knallertin kom av Tinghúsvegnum niðan ímóti Bøkjarabrekku og rendi inn í bilin, sum koyrdi niðaneftir. Tað vísti seg so seinni, at báðir førararnir vóru ávirkaðir av rúsdrekka.

Politiið í Havn upplýsir, at annars hava fleiri onnur eisini verið, sum hava koyrt ávirkað um vikuskiftið.

Ein bilur varð fríggjamorgunin stolin úr Grønulíð í Havn. Hann var seinni funnin aftur við Tekniska skúla í Smiðjugerði.

Í bátahylinum á Argjum hevði onkur brotið inn í ein bát, sum stóð á landi. Har var ein fløguspælari, ein antenna og tríggjar fløgur tiknar, og verður sagt av politistøðini, at gerningsmenninir eru enn ikki funnir.

Fleiri hava eisini sovið rúsin av sær niðri í brummuni. Neyva talið, hava vit tó ikki fingið upplýst.


*Húsini, sum eldur kom í á Sandi fríggjamorgunin, fóru rættiliga illa*

*Mynd: Óskar Óskarsson*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Agnas og Alfred Steensen gullbrúdleyp



Í dag, 15. apríl, kunnu hjúnini Agnas og Alfred Steensen, búsitandi í Hirtshals, halda gullbrúdleyp. Agnas er úr Havn, dóttir Elsbu, f. Wolles, av Trøllanesi og Dánjal á Dul úr Havn. Alfred er úr Klaksvík, sonur Honnu, f. Petersen, úr Fuglafirði, og Eskild Steensen úr Klaksvík. Agnas og Alfred fingu seks døtur, tær eru: Elsebeth, Hanna Tove (Piddan), Guðrið, Sunrid, Rúna og Gvøðny, sum doyði í ferðsluvanlukku í 1983, bert 13 ára gomul. Tey eiga 15 ommu- og abbabørn og langommu- og abbadóttrina Keziu.

Alfred er útbúgvin maskinmeistari og maskinverkfrøðingur. Hann hevur arbeitt sum maskinverkfrøðingur í Føroyum og í Danmark. Seinastu árini hevur hann siglt sum maskinstjóri við donskum og norskum skipum til fyri stuttum, tá hann gavst næstan 71 ára gamal. Agnas arbeiddi heima, meðan børnini vóru smá. Í 1983 fekk hon starv í kantinuni hjá Landsverkfrøðinginum í Havn, har hon var í umleið 10 ár. Síðan 1995 hava tey búð í Hirtshals. Brúdleypið verður hildið fyri innbodnum á Hotel Føroyum. Brúdleypsadressan er Sílagøta 3 í Havn.

## Finn Danberg í leiðslu Sparikassans



Leiðslubólkurin í Føroya Sparikassa hevur fingið ein nýggjan lim. Tað er greitt, eftir at stjórnin í Sparikassanum hevur gjørt av, at Finn Danberg, fíggjarleiðari, skal gerast partur av leiðslubólkinum. Stjórnin í Føroya Sparikassa hevur regluliga fund í leiðslubólkinum, ið veitir henni ráð í ymsum týðandi málum. Hereftir eru sostatt fimm limir í leiðslubólki Sparikassans. Teir eru Marner Jacobsen, forstjóri, Bjarni Olsen, stjóri, Bogi Bendtsen, undirstjóri, Øssur Nolsøe, deildarleiðari í Tórshavn, og Finn Danberg, fíggjarleiðari.

Harumframt hevur fíggjarleiðarin fingið prokura. Nevndin í Føroya Sparikassa gjørdi á fundi tann 24. mars av, at veita fíggjarleiðaranum prokura. Prokura er ein fulltrú, ið ber í sær, at prokuristurin ella álitisfulltrúin, sum hann eisini verður nevndur, kann binda stovnin í øllum viðurskiftum, sum viðvíkja vanligum rakstri. Ein ávísur munur er á tekningarrætti, ið stjórar og nevndarlimir hava, og so prokura. Tekningarrætturin ber í sær, at hann, sum teknar fyritøkuna, kann binda hana mótvegis 3. parti í øllum lutum. Afturímóti kann prokuristurin bert binda fyritøkuna í viðurskiftum, ið hoyra til vanligan rakstur. Eftir at Finn Danberg hevur fingið prokura eru tilsamans tríggir prokuristar í Føroya Sparikassa: Bogi Bendtsen, undirstjóri, Øssur Skeel Nolsøe, deildarleiðari, og Finn Danberg. Finn Danberg er 37 ára gamal, og hevur hann útbúgving sum Cand. merc.aud. Hann hevur síðan 1999 verið fíggjarleiðari Sparikassans. Frammanundan hevur hann starvast sum fíggjarleiðari á Arbeiðsloysisskipanini og á Landssjúkrahúsinum.



## Fimm bygningssnikkarar

Fríggjadagin 11. apríl fingu fimm bygningssnikkarar prógv á Tekniska Skúla í Havn. Teir eru: f.v. Tony Davidsen úr Sandavági, hann hevur lært hjá Johnfinn á Plógv í Sandavági, Meinhart Fríði Hansen úr Havn, hann hevur lært á Sp/f Snikkaravirkið hjá A.I.K. í Havn, Kristian Højgaard og Eyðstein Jacobsen úr Havn, teir hava lært hjá Sp/f Træsmiðjan G.L.T. í Havn, og Hjørleif Klein úr Saltangará, hann hevur lært hjá Sp/f Snikkaravirkið í Rituvík.



## Jens Andreasen 50 ár

Mánadagin 14. apríl, summarmáladag, varð Jens Andreasen, fimmti ár. Jens er havnarmaður. Foreldrini eru Kirsten og Leivur Andreasen. Børnini hjá teimum eru Maria, sum er sjúkrasystir og Jens, sum er lækni.

Jens er giftur við Ebbu, dóttir Fíu og John Høj í Klaksvík. Hon er sjúkrasystir. Ebba og Jens eiga fýra børn: Kirstin, sum lærir til sjúkrasystir í Keypmannahavn, John, Rakul og Sára.

Jens tók studentsprógv í Hoydølum í 1975. Eftir í eitt skifti at hava verið læraravikarur í Eysturskúlanum fór hann til Århus at læra til lækna, og hann leyk prógv í januar í 1985. Fyrsta árið eftir tað arbeiddi hann á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, so var hann tvey ár á Landssjúkrahúsinum, eitt skifti í Piteå í Svøríki, eitt ár kommunulækni í Sandoyar læknadømi og eftir eitt ár í Roskilde hevur hann síðani í 1993 verið á medisinsku deildini á Landssjúkrahúsinum. Tað er eitt ár síðani, at hann gjørdist deildarlækni á B6. Eitt nú tekur Jens sær av diabetis ambulatorinum.

Jens er formaður í felagnum fyri yngri læknar. Tað starvið hevur hann røkt seinastu seks árini.

Umframt frá læknaarbeiðnum er Jens kendur sum sangari. Hann hevur framúr tenorrødd, sum hann síðani á heilt ungum árum hevur ríkað sangkórið í Ebenezer við. Seinastu mongu árini hevur hann eisini verið partur av Dupultkvartettini í Ebenezer.

Jens er tónleikaáhugaður. Hann er góður gittarspælari, og sum ungur gekk hann til klaverspæl hjá Turið Waagstein Rasmussen, og honum dámar framvegis væl at seta seg við tangentarnar, men tað er mest til húsbrúk, sum tað verður tikið til.

Leivur í Ullvøruhúsinum hevur verið góður handverkari, og sonurin hevur arvað evnini. Honum dámar væl at fáast við jarnsmíð. Hann smíðar lampur, stakar og borð, tá ið hann koblar úr frá strævna læknaarbeiðnum, ið hann gongur so sera nógv uppí.

### Gullbrúdleyp

Í dag, 15. apríl, kunnu hjúnini Agnas og Alfred Steensen, Hirtshals, halda gullbrúdleyp. Brúdleypið verður hildið fyri innbodnum á Hotel Føroyum. Brúdleypsadressan er Sílagøta 3, Tórshavn.

### 90 ár

Mikudagin 16. apríl fyllir Gunnhilda Rasmussen í Sandavági 90 ár. Hon er á Ellisheiminum í Vágum, har dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Dagurin

15. apríl. Tær ljósu næturnar byrja. Fyrr stóð navnið Olympia í álmanakkanum til minnis um halga konu, sum varð tikin av døgum umleið 250 í Persiu.